*Ósemjan um markið stendur við:*

# Einki úrslit á fundi í Havn

## *Hittast aftur í London í mars*

Samráðingarnar millum eina føroysk-danska og eina bretska sendinevnd um ósemjuna um markið millum Føroyar og Bretland góvu heldur ikki hesa ferð nakað úrslit. Báðir partar løgdu fram síni uppskot um, hvussu trætan skal loysast og sum tað skilst, so vilja breta ikki víkja frá uppskoti teirra um at miðlinjan skal ikki vera markið millum londini.

Ístaðin vilja teir hava markið at liggja munandi nærri Føroyum. Eitt blað í Skotlandi almannakunngjørdi sunnudagin eitt kort, sum vísir bretska uppskotið. Sambært tí liggur markið einar 50 fjórðingar vestan fyri núverandi miðlinju.

Sambært útvarpinum í gjár, so hava partarnir avgjørt at hittast aftur um eitt hálvt ár, í mars í London.

jan



*Frá samráðingunum í Havn*



*Dánjal Nolsøe og Halgir W. Poulsen eru við í føroysku samráðingarnevndini*



PRESS AND JOURNAL

**Business**

THURSDAY OCTOBER 22 1992

**Faroes boundary talks inconclusive**

JEREMY CRESSWELL

*Skotska blaðkð Press and Journal hevði longu í gjár grein um samráðingarnar*

**Leygarkvøldið 24.10. kl. 21.00 stórt undirhald við Hilmar Jan á Hotel Føroyum**

Út yvir vanligu a la carte matskránna, bjóða vit gestum okkara hetta kvøldið eina serliga Hilmar Jan matskrá.

| | | | |
|---|---|---|---|
| FORRÆTTIR: | 1. Whisky flamberaðar Kina-rækjur við melón, salati, purleyksdyppi og langabreyði | kr. | 72,00 |
| | 2. Nøtustoktur kalvafiskur við salati, oljudyppi og langabreyði | kr. | 56,00 |
| HØVUÐS-RÆTTIR: | 1. Fronsk steak við persillusmøri, rástokt epli og grønmeti | kr. | 148,00 |
| | 2. Búff bearnaise við bearnnnaise sós, rástokt epli og grønmeti | kr. | 154,00 |
| OMANÁ: | 1. Ís-cocktail Symfoni við róma og frukt | kr. | 42,00 |
| | 2. Fylt kramarhús við Chantely-kremi og frukt | kr. | 47,00 |

**3 RÆTTIR FYRI KR. 190,00.**

Gestir kunnu bileggja kømur hetta kvøldið fyri einans 150,00 pr.persón við morgunmati.
Vinarligast bileggið borð á tlf. 17500.

*Altíð vælkomin á Hotel Føroyar* *Tlf. 17500*

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

hevur 2. og møguliga 3. uppstillingarfund til bý- og skúlaráðsvalið í Havn mánakvøldið 26. oktober kl. 19.30. Fundurin verður í felagshølunum – Argjavegur 26.

**Nevndin**